miðvikan

Nr. 161 • 26. august 2009

Síðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Lützen og Faktorin:**

# Sjáldsamur vinskapur millum ættirnar

**Vit eru nú komin til seinasta partin í hesi røð um Faktorin í Klaksvík, hansara ættarfólk, og tey fólk, sum hann hevði um seg. Egil er nú deyður, og nú verður farið afttur til sjálvan Faktorin og ættina hjá Nichels Lützen, sum kom at standa sera nær**



*Johan Christian Djurhuus*



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**6. partur**

Tað hevur verið sera áhugavert at arbeiða við hesi søgu um Faktorin Johan Christian Djurhuus. Áhugin fyri hesum heilt serliga manni varð vaktur av at lesa um hann í bókini hjá J. Símun Hansen "Havið og Vit."

Enn størri gjørdist áhugin, tá komið var eftir, at Faktorin "átti" eina røð við fimm gravsteinum í gamla kirkjugarði í Havn. Nakað samstundis komst fram til søguna um son Faktorin, Jacob Djurhuus, ið "hvarv" sum smádrongur, og sum varð "funnin" aftur í einum kirkjugarði í Grønlandi 100 ár seinni!

Hetta førdi so til fýra greinir í røðini Hendur ið Sleptu, sum lýstu Faktorin, konu hansara og hansara børn.

Men sum ofta er, so førir ein søga eina aðra við sær. Her kom dagbókin hjá Egili, son Sofus undan kavi. Egil umboðaði í sær sjálvum eina syrgiliga lagnu. Fyrst fer mamman frá honum, síðan beinir pápin fyri sær. Umframt hetta gerst hann illa sjúkur og doyr bert 20 ára gamal.

Hildið varð tá, at dagbókin kundi geva grundarlag fyri tveimum Miðvikum, men framvegis kom tilfar undan kavi, og tískil kom henda røðin uppá seks partar.

Her verða lýstar nakrar áhugaverdar lagnur. Talan er um framúr avrik á vinnuliga økinum, men eisini um sorgarleikir á tí persónliga økinum. Men her er eisini søgan um samanhald millum fólk, sum tað kundi vera fyri nærum 100 árum síðani.

Tað er óneyðugt at siga, at tað liggur nógv arbeiði í hesi søgu. Fyrsta keldan var J. Símun Hansen.Men umframt hetta er ein hópur av øðrum keldum, sum hava kunnað gjørt hesa frásøgn so fullfíggjaða, sum hon er. Summar keldur er leitað eftir. Aðrar er komið framá av tilvild, og so eru tað tey, sum vit hava frætt frá, og sum hava kunnað givið eitthvørt ískoyti.

Datt annars nú um dagarnar á enn eitt brot, sum eisini er eitt íkast til hesa søgu. Símun Petur Zachariassen hevði í 1949 í Tingakrossi eina grein um Mourits Winther í samband við, at hann fylti 80 ár. Hann gjørdist versonur Nichels Lützen. Her skrivar Símun Petur millum annað:

"Aftaná skúlatíðina í Havn kom Mourits suður til Sands haðani hann var ættaður. 15 ára gamal kom hann til Klaksvíkar á heysti 1881 í forrætningina hjá Jørgen Bech & Sønner, har hin kendi maðurin Jens Christian Djurhuus var stjóri á handlinum. Tað var ein umfevnandi forrætning, ið ikki bert var fyri Norðoyar, men eisini fyri eystursíðuna av Eysturoynni.

Djurhuus ella Faktorin, sum hann vanliga varð kallaður, vandi teir ungu menn, hann hevði undir hond til góðan handilsskap og kom hann væl ásamt við teir. Tá vóru hesir menn í handilsvirkinum úti í Klaksvík: Nichels Lützen, Karl á Vágsheygnum, sonur hansara Óli og Ludvig Kjelnæs.

Tá var ikki sum nú at hava 8 tímars arbeiðstíð. Teir skuldu møta upp kl.6 um morgunin, og vóru teir ikki lidnir fyrr enn kl. 8 um kvøldið."

Ein av keldunum er Bogi Lützen, langabbasonur Nichels. Hann hevur til hendan partin latið okkum eina frágreiðing um abban Andreas Lützen, gudsonin hjá Egil, Bjarna, og fastrina Ingeborg Lützen, sum helst var tann, sum hevur vitjað Egil Djurhuus eina mest, og sum eisini hevur uppiborð eitt serligt ummæli.



*Ingeborg Lützen f. 1887*



*Andreas og dóttrini Elinborg stuttleika sær við geitarlombum omanfyri gomlu húsini, kanska summarið 1938*

## Bogi um Ingeborg

Ingeborg var næstyngsta barn Nichels' og Sigrid Mariu. Hon er fødd í Klaksvík 1887.

Pápin fylgdi henni til Havnar, tá hon skuldi niður at læra, men hetta skuldi verða seinastu ferð hon sá pápan, tí hann doyði, áðrenn hon kom heimaftur.

Ingeborg var gumma mín, og vit kallaðu hana Abbadidd. Hon var ógift og arbeiddi langa tíð í Føroya Banka í Havn, har hon var sera avhildin.

Millum havnarfólk var hon kallað Ingeborg í bankanum.

Míni fyrstu ár búðu vit í Sørvági, og tað fyrsta eg minnist til Abbadidd var, einaferð pápi og eg vóru á veg úr Sørvági til Klaksvíkar, og máttu gista nátt í Havn. Vit komu seint á kvøldi til hennara, og hon var hørm um, at hon ikki hevði frætt frá okkum fyrr, tí so hevði hon keypt mær Skipper Skræk at lesa!

Fyrst í fimmtiárunum fór hon úr starvi í Havn fyri aldur og flutti til Klaksvíkar. Stutt eftir letur Føroya Banki eina deild upp í Klaksvík, og hon fer aftur í bankan at arbeiða eina tíð aftrat. Og her mundi hon vera ein góður stuðul hjá teimum blaðungu og óroyndu bankamonnunum, sum vóru settir at byrja nýggju deildina.

Í Klaksvík fekk hon sær ein bát, og vit, børnini hjá Hans og Kjartan, fingu mangan túrin við henni. Vit vóru børn, so túrarnir vóru ikki langir - skrubbutúr, har báturin bleiv bundin í Bedingsboyuna, har var fitt av skrubbu at fáa - ella dyrgingartúr við tráðu út á Eingilska Klett og runt Klakkin. Var túrurin langur, komu vit suður til Føgrulíð. Yvir um Kalsoyarfjørð, á Galvin, varð hildið at verða ov langt at fara við børnum. Vit máttu ansa eftir streymi.

Áhugin fyri náttúruni vísti seg eisini við, at hon hevði eitt fitt savn av skeljum - goggum, øðum, kúðingum langaskel - og steinum, hon hevði funnið á gongutúrum í fjøru og haga.

Ingeborg kendi nógv fólk í bygdini, og hevði opið hús fyri kenningum Nýggjársaftan. Tá bleiv heitur punsjur bryggjaður upp í stóran bolla, og heilt nogv fólk gekk inn á gólvið.

Annars gekk Ingeborg høgt uppí lesing, bæði bøkur og bløð. Donsku dagbløðini, Berlingarin